# MENNA RÚMINUM

## List í almenna rúminum – millum Kongaminni og Kitsch

*Fýra fólk fara í hesi greinarøð at hugleiða um list í almenna rúminum. Í fyrsta parti av fýra skrivar Sissal Kristiansen. Greinarøðin er í sambandi við ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 29. apríl.*





Í Keypmannahavn vann hetta listaverkið "My Mama is so Proud" heiðurin at hanga uppi í 2007

Eitt annað dømi er í Norðoyartunnilinum har Tróndur Patursson hevur fingið møguleika at spæla við ljósi og litum. Í einum stórbærum landi, har vetrarnir eru so myrkir sum teir eru, eru tað uttan iva mong, sum fegin vilja seta meira lív í.

Og menningin innan tøkni, forrit og útgerð ger tað gjørligt, tí við menningini fylgja enthusiastarnir, tey sum spæla, royna, læra og meistrað tøknina. Vit kenna tað innan VJ'ing, sum tykist hava fóta sær í Føroyum. Og fyri ein sum fæst við VJ vildi møguleikin at sleppa at vísa síni kynstur úti í myrkrinum verið sum at givið einum málara eitt nýtt lørift.

### Lýsingaskelti

Tað triðja, eg havi hug at nevna, er eisini ein nattúrligur partur av okkara samtíð; lýsingaskelti, busslýsingar og talgildir skermar í býarmyndini. Mong meta hesa marknaðarføring sum verandi til ampa. Har eri eg ósamd, men eg sakni, at størri æstetisk krøv verða sett til hesa marknaðarføring, tí miðilin er til tað.

Uttanlands síggja vit veldugar imageplakatir fyri fyritøkur við høgum æstetiskum sansi og krøvum. Veruliga flotta marknaðarføring, sum fyri mær er heilt listarlig.

Í Føroyum eru vit ikki heilt har - enn. Men heldur enn at ynskja miðilin har piparið grør, haldi eg at vit skulu lofta honum, seta krøv til kreativari nýtslu og kanska endurumhugsa, hvussu miðilin kann brúkast.

### Gevið listafólki rúm

Diesel kundi givið okkum íblástur til, hvussu vit kundu brúkt almenna rúmið betur.

Við átakinum "the Diesel Wall" gevur Diesel aftur til samfelagið og er við til at stimbra nýskapan og kreativitet og geva ungum myndlistafólkum og grafikarum ein pall at deila sína list í almenna rúminum.

Við yvirskrifti "Get your art featured in the worlds largest outdoor gallery" hava tey kappingar, har listafólk kunna vinna sær pláss á einum stórum veggi á útvaldum bygningum í evropæiskum býum, í styttri tíðarskeið.

Sum branding er hetta dýrabært fyri Diesel, sum vísur at fyritøkan hevur yvirskot, at hon stuðlar kreativiteti og eini vinnugrein, sum ofta hevur trong kor. Talan er um kreativa branding, men hon virkar einans tí at hon loftar einum tørvi, einum tørvi á einum palli, har ung, nýhugsandi og djørv listafólk kunna frambera sína list.

Bygningar sum kundu klætt at verið prýddir hava vit nokk av í Føroyum. Eitt nú eri eg sannførd um, at sápufabrikkin á Eystara Ringvegi í Havn ikki kann vera ljótari enn tað sama, og tær lýsingar sum hanga har, eru allar við til at gera bygningin minni ljótan. Kundi bygningurin, prýddur við list, blivið meira enn "minni ljótur"? Ja sigi eg!

Myndugleikin skal ikki altíð síggja møguleikarnar, tað ger listafólkið - myndugleikin skal ikki skapa listina, men geva listafólkinum rúm, álit og møguleikan - so skal listin nokk blomstra.